LANDSVERK

Til tey, ið ynskja at bjóða uppá arbeiðið

**22 august 2017**

**Sølvi Sjúrðarson**
Journalnr. 17/000413

**Útbjóðing av eftirlitið og elektriskum viðlíkahaldi í Norðskálatunlinum, Leynatunlinum, Hovstunlinum, Viðareiðistunlinum, Leirvíkartunlinum og Kollafjarðatunlinum í tíðarskeiðinum frá 1. Oktober 2017 til 30. September 2020.**

**Útbjóðingartilfarið umfatar**:

1. Útbjóðingarskjalið (hetta skjalið)
2. Tilboðslista
3. Høvuðstilboðsskjal
4. Tekniska dokumentatión
   Leinki: http://88.85.57.10/owncloud/index.php/s/op7MVwhlxv0MZSF
5. Trygdarætlan um arbeiði í tunlum

Vit loyva okkum at minna á, at byggiharrin eigur útbjóðingartilfarið, og at tað ikki má brúkast í øðrum sambandi.

Treytir fyri at innkomin tilboð kunnu góðtakast, er at hesar upplýsingar vera latnir inn við tilboðnum:

1. Trú og heiður váttan (Kann heintast á heimasíðu okkara á leinki: http://www.landsverk.fo/fo-fo/um-okkum/oy%C3%B0ubloe%C3%B0.
2. Galdandi prógv fyri skeiðið ”Vegurin sum arbeiðspláss” ella líknandi.

**Tilboðsgrundarlag**

Boðið verður út eftir target prís frymlinum, og er roknaður til:

| | |
|---|---|
| Kollafjarðatunnilin: | kr. 13.000,00 u/mvg (Trettan túsund krónur.) fyri hvørt ár |
| Leirvíkartunnilin : | kr. 8.000,00 u/mvg (Átta túsund krónur.) fyri hvørt ár |
| Norðskálatunnilin: | kr. 43.000,00 u/mvg (Fýratitrý túsund krónur) fyri hvørt ár |
| Leynatunnilin: | kr. 41.000,00 u/mvg(Fýratieitt túsund krónur) fyri hvørt ár |
| Hovstunnilin: | kr. 43.000,00 u/mvg (Fýratitrý túsund krónur) fyri hvørt ár |
| Viðareiðistunnilin | kr. 32.000,00 u/mvg /trýati tvey túsund krónur) fyri hvørt ár |
| Samlaður prísur | kr. 180.000,00 fyri hvørt ár u/mvg (Hundraðogáttati túsund krónur) |
| Tilsamans í trý ár | kr. 540.000 u/mvg (Fimm hundrað og fýrati túsund krónur) |

Arbeiðið umfatar Norðskálatunnilin, Leynatunnilin, Hovstunnilin, Leirvíkartunnilin, Kollafjarðatunnilin og Viðareiðistunnilin. Viðlíkahaldsavtalan er galdandi í 3 ár. Møguleiki er at bjóða

uppá arbeiðið antin samlað ella hvønn tunnil sær. Fyri at kunna samanbera tilboðini, skulu øll at seta tilboðið upp soleiðis at ongin ivi er um hvat eftirlitið og viðlíkahaldi kostar fyri hvønn einasta tunnil.

Tilboð skulu gevast av góðkendum el-innleggjara, og skulu tilboð, umframt útinning, umfata tilboð uppá veiting av eykalutum.

Arbeiðstakari skal eisini upplýsa mestu tíð, tað tekur at koma til tunnilin, um ólag kemur á el-skipanini. Telduførleiki er neyðug fortreyt fyri at útinna arbeiðið.

Tilboðið skal grundast á viðlagda tilboðslistan, og skrivast á viðlagt høvuðstilboðsskjal.
Á tilboðslistanum er lýsingin av hvørjum arbeiðið býtt upp í 5 punkt.

1. **Rað nr.**: Rað nummar, sum eisini skal nýtast ísv. skráseting av viðlíkahaldinum.
2. **Arbeiði**: Yvirskrift yvir viðlíkahaldsarbeiði.
3. **Lýsing**: Útgreinandi lýsing av hvat viðlíkahaldsarbeiði umfatar
4. **Títtleiki**: Ásetir títtleikan fyri viðlíkahald.
5. **Dag/nátt**: Arbeiðsánarin setur sum krav at ávís viðlíkahaldsarbeiði skulu gerast sum náttararbeiði. Hetta er grundað á um mett verður at arbeiðið tarnar ferðsluni somikið nógv, at tað skal gerast um náttina meðan tunnilin er stongdur.

**Skipanir**
Sum viðlíkahalds og skrásetingarskipan verður SMART nýtt. Hetta er ein skipan, sum er web-baserað, og Landsverk gevur arbeiðstakaranum atgongd til skipanina.

SRO skipan er í Norðskálatunlinum, Leynatunlinum, Viðareiðistunlinum og Hovstunlinum.
Arbeiðstakari skal hava atgongd til SRO skipanina í tunlunum á sínari skrivstovu. Ein týðandi fyritreyt fyri arbeiðið er, at arbeiðstakarin hevur dagligt eftirlit við alarmum á SRO skíggjanum. Hetta arbeiðið skal gerast eftir føstum mannagongdum. Fyri at síggja SRO skermmyndina krevst Windows telda við interneti. Landsverk útvegar teldu og VPN samband í sáttmálaskeiðinum. Teldan skal ikki nýtast til annað endamál

**Arbeiði í tunlum**
Tað er av stórum týdningi at ferðslan í tunlinum verður órógvað sum minst, meðan tunnilin verður hildin viðlíka. Tí kunnu krøv verða sett til ávís tíðarskeið á samdøgrinum, tá arbeiðið kann fara fram. Tá arbeitt verður fram við landsvegi, skal arbeiðstakarin søkja um arbeiðsloyvi áðrenn arbeiðið fer í gongd. Landsverk setur sum treyt at arbeiðstakarin fylgir trygdarætlan fyri arbeiði í tunlum, sí viðlagt skjal nr. 5.

**UPS Anlegg**
Fyritøkan sum serviserar UPS Anlegg, skal hava góðkent certifikat til hetta.
Tað er ikki neyðugt at fyritøkan uppfyllir alla treytir og góðkenningar tá bjóða verður. Um fyritøkan ikki kann uppfylla treytirnar, skal fyritøkan hava gjørt avtalu við góðkenda fyritøku, áðrenn avtalan verður undirskrivað, ella vísa ítøkiliga ætlan fyri hvussu fyritøkan fær hesa góðkenningina.

**Undirveitarar**
Tilboðsgevarin skal at upplýsa møguligar undirveitarar ísv. tilboð, ið skulu góðkennast av útbjóðaranum.

**Vekting av innkomnum tilboðum.**
Tilboðini vera mett eftir *kostnaði*, *organisatión* og *tilkallitíð*. Hesi verða vektað innanhýsis, sum víst í klombrum ().

1. Kostnaði (50%)

Prísur, samlað fyri allar tunlarnar ella tunlarnar hvør sær.
Stig verða givin á henda hátt. Boð sum samsvarað við target prísin fáa 7 stig.Boð, ið eru 30% lægri enn target prísurin , fáa 10 stig.
Boð sum eru 20% hægri enn target prísurin fáa 0 stig og verða ikki tikin við í dømingina.

2. Organisatión (35%)

Organisatiónin verður góðskumett eftir tilboðsgevarans frágreiðing um organisatiónsætlan og cv hjá lyklapersónum.

3. Mesta tilkallutíð (15%)

Umráðandi er fyri trygdina í tunlunum, at tilkallitíðin er so stutt sum gjørligt.

Tilboðini verða síðan mett eftir einum skala frá 0 til 10.

**Møguligir ástaðarfundir**
Ástaðarfundur verður sum víst niðanfyri, har tilboðsgevarar hava høvi at kunna seg um viðurskiftini á staðnum og at seta spurningar. Farið verður til **Leynatunnilin mikudagin 13. sept kl. 10.00** við tunnilsmunnan ímóti Kollafirði. Síðani verður farið til Kollafjarðatunnilin

Farið verður ikki til hinar tunlarnar vísandi til at omanfyri nevndu tunlar eru umboðandi tólbúnaðinum á hinum tunlunum.

Spurningar annars skulu verða Landsverki í hendi í seinasta lagi 5 arbeiðsdagar undan innlatingarfreistini. Innkomnir spurningar verða svaraðir í seinasta lagi 3 arbeiðsdagar undan freistini.

Tilboðini skulu verða inni 22. september 2017 kl. 13:30 og verða latin upp 22. september 2017 kl. 13:30
Um tit ikki verða hjástaddir skal tilboði verða avhenda hjá Landsverki á høvuðsskrivstovuni í móttøkuni í seinasta lagi 22. september 2017 kl. 12:00.

Vinaliga

**Sølvi Sjúrðarson**